# Fyritøkur í Saltangará stongdar av oljuroyki




– *Vit hava verið noydd at lata skrivstovuna aftur – bæði tí, at starvsfólkið ikki hevur orkað at verið í hølunum fyri royki og tí, at tey, sum koma inn á gólvið, partvís eru vend útaftur eftir, at tey hava kent hendan roykin í næsarnar, sigur Leivur Fonn, stjóri í Fonn Flog*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Fyritøkan, Fonn Flog, sum húsast í bygninginum oman fyri Statoil í Saltangará og handilin, Trend Floor, sum selir klæðir, hava verið noyddir at lata aftur, tá ið roykurin hevur verið ringastur**

ROYKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í greinini á blaðsíðu fýra í dag tosa vit við stjóran í Statoil, Niels Juel Nattestad, um tað arbeiði, sum felagið í løtuni ger við at finna út av, um møguligur oljuroykur í grannalagnum við Statoil í Saltangará kann stava frá onkrum leka í tangum ella leiðingum, sum felagið hevur inni á sínum øki.

Tað er serliga á ávísari ætt, at Fonn Flog, Trend Floor og Com-Data hava varnast royk, sum hildin verður at vera oljuroykur.

– Onkran dag á høgætt hevur hetta verið ein rættiligur trupulleiki, sigur Leivur Fonn, stjóri á Fonn Flog.

### Stongdu hølini

Hann vísir á, at tey hava verið noydd at lata skrivstovuna aftur – bæði tí, at starvsfólkið ikki hevur orkað at verið í hølunum og tí, at tey, sum koma inn á gólvið, partvís eru vend útaftur eftir, at tey hava kent hendan roykin í næsarnar.

– Vit vita ikki, hvaðani hesin roykur stavar, og vit vita heldur ikki rættiliga, hvat hetta er fyri ein roykur. Men hann minnir um oljuroyk, leggur hann aftrat.

Leivur sigur, at Arbeiðseftirlitið hevur verið á staðnum og gjørt sínar kanningar, men hann sigur seg hava skilt, at júst hendan dagin var roykurin ikki av tí ringasta.

– Sum eg havi skilt, hevur roykurin á ávísari ætt serliga gjørt um seg í hølunum hjá okkum, hølunum hjá Trend Floor og í hølunum hjá Com-Data.

### Stjórin fegnast

Leivur sigur, at tey hildu í fyrstani, at roykurin kanska kundi stava frá onkrum av veskunum, sum AWJ brúkar í sínum arbeiði, men so er ikki.

– Sum eg havi skilt, hevur AWJ ikki havt teir stóru trupulleikarnar við royki, leggur hann aftrat.

Stjórin í Fonn Flog sigur seg vóna, at trupulleikin skjótt verður loystur, og hann sigur seg fegnast um, at Statoil nú er farið at leita eftir, um roykurin møguliga stavar haðani.

– Vit hava hugt at øllum, sum møguliga kundi verið ein orsøk til roykin, men duga ikki at síggja – ella lukta, at roykurin stavar her úr húsunum, sigur Leivur Fonn.

*Lesið grein á s. 4*

## Tíðin er farin frá oljutunnum á útoyggj

TÍÐINDASKRIV
*frá Sambandsflokkinum*

Á tingfundinum mikudagin setti Marjus Dam, løgtingsmaður, ein munnligan fyrispurning til Jacob Vestergaard, landsstýrismann viðvíkjandi oljuflutningi til útoyggjar. Marjus Dam spurdi, um landsstýrismaðurin ætlar at taka stig til, at oljuflutningur til útoyggjar verður fingin í eina legu, ið hoyrir nútíðini til.

Marjus Dam vísti í viðmerkingunum til fyrispurningin á, at oljuflutningur til útoyggjar fer á okkara døgum fram við oljutunnum. "*Hundraðtals oljutunnur skulu flytast til og frá útoyggj, upp og niður til lendingar, og upp og niður frá traktorum*". Hann vísti á, at harafturat hoyrist, at í mong ár hava útoyggjafólk goldið ein hægri prís fyri hesa nógv verri tænastu". Ein fylgja av hesum er, at rættiliga nógvar oljutunnur enda á havinum, ikki tómar fyri olju.

"*Eg meti, at tíðin nú er komin til, at oljuflutningur til útoyggjar verður fingin á eitt støði, ið hoyrir nútíðini til, og at landsstýrismaðurin ið varðar av hesum máli, tekur stig til, at hesin flutningur verður fingin í rættlag – til ein kostnað, ið er eins fyri allar borgarar her á landi*", segði Marjus Dam.

Í svarinum játtaði landsstýrismaðurin, at nakað ítøkiligt fór at verða gjørt við málið. Marjus Dam fýltist á, at hetta mál ikki er loyst fyri langari tíð síðan. Hann takkaði landsstýrismanninum fyri svarið og vónaði, at málið bleiv loyst. Um ikki fór lógaruppskot um hetta at verða lagt fyri Føroya Løgting í heyst.

## VIÐMERKINGAR

# Saknur í Janusi Mohr



VAGNUR MICHELSEN

Hvønn sunnudag í nógv Harrans ár millum klokkan 13.40 og 14.00 hevur Janus Mohr ríkað okkum lurtarar við frálíkari sending við føroyskum sangum. Ein av tryggu hornasteinunum í vikuskránni hjá Útvarpi Føroya.

Men 1. apríl tagnaði serliga røddin úr Hoyvík, maðurin er farin frá fyri aldur.

Sendingin Føroyskir sangir sunnudag var serlig, sjálvt um hon ikki var longri enn tjúgu minuttir. Janus hevði altíð innleiðandi viðmerkingar um náttúruna, serligar dagar í vikuni, stevnurnar, føðingardagar hjá føroyskum skaldum og ymiskt annað, hann nú kundi finna uppá í sendingini.

Dýrabærir skattir eru goymdir í Sortudýki. Skattirnir eru teir hundraðtals føroysku sangirnir Útvarp Føroya hevur ognað sær, síðani tað sendi fyrstu ferð í 1956.

Janus Mohr og onnur hava ferðast kring landið og tikið upp føroysku sangirnar, tað veri seg einrøddaðir sangir ella kórsangir av ymiskum slag. Rúgvismikla tilfarið er størsti og tyngsti hornasteinurin í Útvarpi Føroya.

Sendingin Føroyskir sangir, sum Janus Mohr meistarliga legði til rættis, hevði rætta plássið í skránni. Sunnudagur og fólk flest høvdu frí. Summi høvdu etið døgurða og onnur vóru við at setast til borðs.

Føroysku sangirnir og røddin hjá Janusi fingu tankarnar at sveima, tí hvør sangur, Janus valdi til sendingina, hevði altíð ávísan boðskap. Tú mestsum steðgaði upp og tók samanum hesa løtuna.

Janus Mohr, takk fyri frálíkar sendingar við føroyskum sangum. Útvarp Føroya er nú eina frálíka sending fátækari.

Lesið Sosialin - so eru tit við



Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag

hevur ársaðalfund fríggjadagin tann 24. mars kl. 20.00 í Bjargingarfelagshúsinum í Kollafirði.

Nevndin